verða nevnt, at tvær ferðir verður sipað til Nikodemus, sum er kendur úr Jóhannesar evangelium, og at tá Hávarður kemur í fongsul, situr hann har sjálvurtriði. Og hetta, at hjálpa teimum glataðu seyðunum, er, óneyðugt at siga, hansara størsta mistak. Tí av øllum øvundarmonnum eru tað teir, sum hata hann mest.

Rithøvundurin telist millum teir fremstu í liðinum av (kanska ikki so mongum) veruligum intellektuellum, sum Norra hevur fostrað. Hann vísti hetta sum bókmentaligur forlagsráðgevi, serliga í tríati-árunum, og ikki minni sum ein, ið tíðliga, við glógvandi skilbundnum greinum, fór í hernað móti nazismuni og – hóast hann upprunaliga var radikalur sosialistur – sum ein tann fyrsti, ið sá at nazisma og kommunisma, í útgávuni hjá Stalin, vórðu úr sama bergi brotin.

Hann vísti hetta eisini sum fjølkunnugur og forvitin essayhøvundur. Ein tann besta og best skrivaða ritroyndin hjá Sigurd Hoel er eitt essay, hann skrivaði um tær norrønu fornsøgurnar. Hoel, sum var runnin úr norskum bygdasamfelag, vísti í hesi grein, at hann kendi hugaheimin í fornsøguni at kalla innanífrá, sum rótgrógvin norðbúgvi.

## Tilvild ella lagna

Hetta sæst aftur í *Gandaringinum*, sum bæði er søgulig skaldsøga, krimisøga, samfelagslýsing, lagnuskaldsøga og eitt slag av fornsøguteksti. Rannvá er nøkur ár eldri enn Hávarður, og samstundis sum stjúkdóttir hennara, Kirstin, veksur upp og verður ein óvanliga vøkur, heldur still genta við stórum, lýsandi eygum, verður hesin aldursmunur ein vansi. Dramatikkurin veksur, tá ið Hávarður og Kirstin, støðd uppi á setrinum, verða álopin av eini bjørn. Hávarður fellir bjørnina við sínum líggja, eitt undur er tað, at líggjablaðið sker inn ímillum hennara rivjabein, og tá er tað Hávarður, eins og Martin Birck, hoyrir kirkjuklokkur ringja. Eitt tortýtt tekin – men um hvat?

Nú tekur ein hending aðra við sær, sjalusi tekur seg upp, eitt óhapp hendir, og í tí bygdin dregur alt sítt níðingssinni og hatur saman í eitt svart knýti, upplivir lesarin tann stóra grikska sorgarleikin.

Millum mótsagnirnar í hesum teksti er tann fremsti helst tví- og samdrátturin millum upplýsing og pátrúgv, frælsi og lagnuhugsan. Hávarður er upplýsingarmaður, men er samstundis framsíggin. Ikki bara tað, umaftur og umaftur upplivir hann (og lesarin) dømir um tað fyribrigdið, sum C.G. Jung rópti *synkronisitet*, tilvild, sum - tá ið saman um kemur - kanska ikki er tilvild. Tvídrátturin millum frælsishugsan og determinismu verður hvestur, tá ið júst royndin at skáka sær undan lagnuni, førir høvuðspersónin í hennara føvning. Einum renna í huga hesi orð, søgd av Iokaste, í *Oedipus Tyrannos* eftir Sofokles:

*Hvat skuldi maður óttast, sum tilvildar kor valda, tá greiður varhugi er av ongum? Best er at liva miðleyst ...*

## Skyld og bót

Hávarður er maður, ið vil brenna brýr og byrja av nýggjum. Men fortíðin hevur ikki hug at sleppa honum, einamest minnið um gentuna, hann sveik, og sum druknaði seg. Skaldsøgan endar við rættarmáli, dómi og straffi, og samstundis verður skaldsins tak á síni frásøgn og sínum evni alsamt fastari, hansara fatan djúpari og hansara flog hægri. Við átta síðum lýsir Hoel eina heksajagstran, sum lesarin ongantíð gloymir.

Áhugavert er at høvuðspersónurin, sum er fyri dómsmorði,



*Fundur í Den norske forfatterforening í 1952 á Restaurant Georges. Frá vinstru: Jakob Sande (1906-67), Arnulf Øverland (1889-1968), Sigurd Hoel (1890-1960) og Helge Ingstad (1899-2001) sum roykir pípu*

tó kennir seg sekan og á ein hátt góðtekur bæði dóm og revsing. Arthur Koestler var ein fyrimynd hjá Hoel, og júst hetta sálarfrøðiliga snarið, at verða órættvíst dømdur og tó vita seg sekan, finna vit eisini í *Darkness at Noon* eftir Koestler, kanska tí mætastu politisku skaldsøguni, sum kom í 20. øld. Í skaldskapinum eftir Sigurd Hoel er hetta evni ikki nýtt, og tað er tí merkiligt, at Koestler upprunaliga ætlaði at rópa sína skaldsøgu *The Vicious Circle* – Gandaringurin. Tilvild?

## Hatrið til yvirlutan

Og hvat er tað so, um djúpast verður grivið, sum drívur hesar vesælu skepnur í Norðurbygdini at gera sum tær gera og hugsa sum tær hugsa? Alt, tykist høvundurin siga, kann fyrigevast, bara ikki eitt: menniskjans yvirluti, at vera stoltari, vakrari, frælsari enn hini. Men enn eina ferð, móti endanum á bókini, ger høvundurin eitt nýtt snar, tá ið hann avdúkar, at víst er óndskapurin djúpur og víst er Kristafár á Bergi eitt bakbeist, men at sín versta mótstøðumann, tann kalda telvaran, sum var stýrdur, ikki av kenslum, men av sínum viti, hevði Hávarður onki grun um. Hetta skal lesarin eisini sleppa at eiga á.

*Gandaringurin* er, hvussu tú so vendir henni, eitt meistaraverk. Hon er skaldaborin, vøkur, vís, blúgv, ómetaliga spennandi og orðað við fynd og sparsemi. Av nýggjari skaldsøgum veit eg bara eina, sum eg havi hug at líkna hana við, *Livläkarens besök* eftir P.O. Enquist, sum hon eisini av sjálvsøgdum grundum er skyld við. At bókin er so væl umsett ger hana til ein fong í hesi lestrarkargu tíð, gloypubita og góðgæti bæði hjá vanligum lesarum og hjá næmingum og lærarum.

Av somu orsøk er tað spell, at henda skaldsøgan í støðum ikki er nóg væl rættlisin. Onkustaðni mangla orð, í summum førum verða reglur uttan grund brádliga kappaðar av, í øðrum førum er bland í persónsnøvnum. Kemur bókin út í øðrum upplag, og tað hevur hon uppiborið, eigur hon at verða vandaliga rættlisin og búgvin til prentingar í einum sniði, sum stendur mát við hennara listarliga virði.

Sigurd Hoel: Gandaringurin.
Hans Thomsen týddi eftir Trollringen (1958). Sprotin 2009. 218 kr.

---

okkara mest kompetentu nevndum innan økið, skal sjálvandi síggjast aftur í einum komandi heimsatlassi, annars er ongin grund til at útgeva eitt nýtt.

## Babbasa ATLAS

Tað kann undra, at stjórin fyri tí nýggja Vitanardeplinum, Magnus Tausen, hevur eina so stagneraða ella fastlæsta fatan av atlasproblematikkinum og tvíheldur um, at tað nýggja atlassið skal brúka navnalistan frá 1993, umframt at okkara mest kompetentu geografar og granskarar á økinum verða hildnir uttanfyri, tí teir ikki frammanundan treytaleyst góðtaka babbasa íslandificeraða navnalista frá 1993.

Spindoktarin aftan fyri tey mongu margháttligu og nógv umstríddu nøvnini í 1993 atlassinum, er nevniliga pápi Magnus Tausen, Svenning Tausen. Málsliga er Svenning Tausen rúkandi ósamdur við núverandi málnevndarformannin, Jógvan í Lon Jacobsen, og hevur í bløðunum sáað iva um Jógvan í Lon Jacobsen yvirhøvur hevur tign og førleika til at sita í lærda stólinum í føroyskum úti á Setrinum, har fráfarni professarin, Johan Hendrik Winther Poulsen, áður sat.

Emotionelt er hetta væl skiljandi, tí fráfarni professarin og Svenning Tausen málsliga einvegis drógu somu puristisku línu til heimsatlassið frá 1993, uttan fyrivarni og atlit til altjóða fakligar konventiónir, sum vóru/eru galdandi innan geografiska fakøkið.

## Viðhaldsfólk vælkomin

Á almennum fundi í Miðlahúsinum 19. mai 2010 kl. 19:30, sum Skúlabókagrunnurin skipaði fyri, varð spurt, um vit skulu hava eitt nýtt heimsatlas og um so var, hvat skuldi standa í einum nýggjum føroyskum atlassi.

Alt byrjaði opið og gott, men tá saman um kom stóð alt í botni frá 1993. Tey sum vóru positiv fyri gamla atlassinum síggjast aftur í fakliga fylgibólkinum, kanska við einum undantaki, men teir geografar sum høvdu kritiskar, men fakliga vælgrundaðar viðmerkingar, síggjast ikki í fakliga fylgibólkinum. Tískil er eingin av okkara vælkvalificeraðu geografum við altjóða royndum í undirvísing og gransking við yvirhøvur til at forma tað nýggja heimsatlassið, tí teir máttu fyrst góðtaka babbasa atlas sum grundstøði, og tað segði teirra fakligheit nei takk til. Teir gomlu søgdu, at djúpt skal hann níga, sum høsnareyv vil kyssa, og rætt er tað!

## Biologur ikki geografur

Nú endaði tað so við, at ein biologur og ikki ein geografur skal týða atlassið úr enskum, skil tað hvør ið vil? Spennandi verður at síggja hvør skal viðgera og rættlesa?

Vit skulu minnast til, at hetta er eitt atlas fyri alt Føroya fólk og skal avspegla heimin, sum hann er í dag og ikki bara babbasa útlegging frá 1993. Kanska er tað við at ganga upp fyri Føroya fólki, hví vit eru nummar sjokk til PISA kanningar

Um nú Skúlabókagrunnurin ístaðin var fyrisitingin úti á Landssjúkrahúsinum, so hevði tað verið Magnus Tausen et al. sum skurðviðgjørdu, við sjúkrahjálparum og portørum sum fakligum fylgibólki, meðan yvirlæknarnir stóðu uttanfyri og bankaðu upp á dyrnar. Tá kann ein og hvør ímynda sær úrslitið, og soleiðis kann tað eisini enda við (heimagjørda) heimsatlassinum.

Spurningurin er hví Skúlabókagrunnurin ræðist vælútbúgvin fólk við universitetsførleika og og drúgvum altjóða royndum, meðan teir hálova dilettantum?

Kanska okkara mentamálaráharri átti at hugt nærri eftir framferðarháttinum hjá Skúlabókagrunninum í sambandi við tað nýggja heimsatlassi. Sambært proklamatión frá hennara egna flokki, skulu Føroyar teljast millum heimsins førandi í 2015, men tað verður man ikki við at byggja á eitt dilettantiskt ástøði!

Finnland er eitt gott dømi um, hvat eitt land kann fáa burturúr, tá fólk við universitetsførleika blíva brúkt til tað tey eru best til.

## Hvar er fakligi førleikin?

Tit tykjast at hanga fastir í 1993 útgávuni av heimsatlassinum, og hava uttan nakra fakliga nøktandi grundgeving útihýst fakliga kompetentum geografum. Tess vegna fari eg vinarliga, vegna føroyska skattagjaldaran, at seta tykkum trimum Niels Petersen, stjóra, Birgir Kruse, ritstjóra og Magnus Tausen, stjóra á Vitanardeplinum, ein almennan spurning hvør og biðja um eitt svar í bløðunum.

**1.** Hvønn dokumentaraðan geografiskan ella landafrøðiligan fakligan førleika hava tit hvør sær, sum ger tykkum skikkaðar til at frávelja fakliga best skikkaðu geografanar og sjálvir standa fyri útgávuni av einum komandi heimsatlassi?